

## Arnbjørn úti í seks vikur

Arnbjørn Hansen hjá EB/Streymi verður neyvan tøkur hjá felagnum, fyrr enn vit eru komin væl inn í mai mánaði. Í dystinum í kappingini um Løgmanssteypið mikudagin fekk Arnbjørn ein snudd, men roknað varð tó ikki við, at hesin var so álvarsligur.

Í dag eru boðini frá læknanum tó, at eitt bein í fótinum er brotið. Tí verður talan helst um steðg upp á einar 4-6 vikur, áðrenn hann yvir høvur kann byrja at venja aftur. Og sannlíkt er tí, at fittur partur av mai mánaði er farin, áðrenn hann aftur kann gera um seg í EB/Streyma-álopinum.

## Gott veður til landsdyst

Seinnapartin í morgin bresta føroyska og ukreinska landsliðið saman til dyst á Svangaskarði. Fleiri fólk fara uttan iva at hyggja eftir dystinum. Hesi fara óansæð hvussu veðrið er. Onnur eru helst meiri áhugað í veðurlíkindunum: Verða tey góð, so fara tey frá húsum. Tað er kortini alt sum bendir á, at veðurlíkindini verða av teimum frægu til landsdyst í morgin. Sambært forsøgnini hjá DMI verður hann sunnan í ættini, millum 8 og 13 metrar um sekundið. Tað verður haraftrat skýggjað og kanska regn. Og hitin verður millum 6 og 9 stig. Hetta skuldu alt tala fyri góðum veðri til dystin. So vóna vit bara, at úrslitið verður hareftir.

# – Lúskan skal nokk halda til eitt skot



*Súni Olsen hevur áður dystast við Cissé og leygardagin skal hann stríðast við millum aðrar Shevchenko*

**Súni Olsen er við aftur á landsliðnum, eftir at hann hevur havt trupulleikar við lærkrikanum í sjey mánaðir. – Eg eri hampiliga væl fyri og formurin er tætt 100%, sigur Súni Olsen og lovar, at lærkrikin nokk skal halda til eitt skot, um hann sleppur til**

LANDSLIÐIÐ
*Rólant Waag Dam*
*rolant@sosialurin.fo*

– Nú eru vit nógvir komnir niðri frá, og vit eru svangir nú vit eru komnir heim. Ja, allir eru svangir og uppsettir. Tað sigur Súni Olsen, sum loksins er við aftur á landsliðnum.

Hann hevur verið úti við skaða í sjey mánaðir við trupulleikum í lærkrikanum.

Um vikuskiftið spældi hann á næstbesta liðnum hjá AaB. Hann spældi mitt í miðjuni og var nógv tann besti maðurin á vøllinum.

– Eg eri hampiliga væl fyri og formurin er tætt 100%, sigur Súni Olsen og játtar flennandi, at lærkrikin nokk skal halda til eitt skot, um hann kemur í skotstøðu.

### Vantandi virðing

Súni Olsen er saman við útsetunum Andrew av Fløtum og Jón Róa Jacobsen við aftur á landsliðnum. Hetta styrkir munandi um føroyska liðið, og Súni metir sjálvur, at teir kunnu geva liðnum eina breidd, sum møguliga hevur vanta í hinum dystunum.

– Vit hava spælt fleiri dystir á høgum støði, og tað kann hava nógv at siga í slíkum dystum, metir Súni Olsen, sum hevur góðar vónir til dystin leygardagin.

– Vónirnar eru góðar. Vit hava heimavøll, og teir koma til landið bara 20 tímar áðrenn dystin. Tað kundi verið eitt tekin um, at virðingin fyri okkum ikki er tann stóra, sigur Súni Olsen, ið heldur, at landsliðið eigur at gera sær dælt av hesum.

Mjølnir-Fleyr 2-3 (23-25, 18-25, 25-15, 25-18, 14-16)

# Fleyr vann seinna dystin

**Fleyr vann seinna upp- og niðurflytingardystin í flogbólti hjá kvinnum ímóti Mjølni, og tí skal ein triði og avgerandi dystur til, áðrenn ein vinnari verður funnin**

FLOGBÓLTUR
*Teitur Joensen*
*teitur@sosialurin.fo*

Týskvøldið eydnaðist Mjølni at vinna 3-0 ímóti Fleyr í Gundadalshøllini í fyrsta upp- og niðurflytingardystinum í flogbólti hjá kvinnunum, og tí var alt, sum bendi á, at Mjølnir fór at varðveita sessin í meistaradeildini.

Hjá Fleyr var setningurin hinvegin púra greiður undan seinna dystinum í Klaksvík í gjárkvøldið. Um tær ætlaðu sær upp í meistaradeildina, so skuldi hesin dysturin vinnast.

### Fleyr fekk flúgvandi byrjan

Hevði nakar væntað, at Mjølnir fór at vinna sannførandi í seinna dystinum í Klaksvík, so fóru tey fullkomiliga skeiv. Tí Fleyr var nevniliga liðið, sum fekk eina flúgvandi byrjan uppá dystin. Munurin var tó ikki tann heilt stóri í fyrsta settinum. Mjølnir royndi at fylgja við, men Fleyr tóktist alla tíð at vera oman á. Tær settu stórt trýst á Mjølnir við góðum servum, og tær vístu seg eisini at vera sterkari í álopspartinum.

Tað endaði eisini við, at Fleyr vann fyrsta settið 25-23.

Í øðrum setti var gongdin á leið tann sama, men nú megnaði Mjølnir als ikki at fylgja við. Fleyr legði seg á odda mest sum alt fyri eitt, og sum settið leið, øktu tær bara um munin. At enda vann Fleyr ein tryggan 25-18 sigur í øðrum setti.

Sostatt hevði Fleyr nú lagt seg á odda 2-0, og alt bendi á, at Fleyr fór at vinna henda dystin.

### Vend kom í

Í triðja setti var tó fullkomiliga vent í holuni. Var nakar, sum væntaði, at Fleyr fór at vinna hetta lættliga, so fóru tey skeiv. Nú legði Mjølnir bragdliga fyri, og sum settið leið, gjørdist greitt, at hetta fór Mjølnir at vinna lættliga.

Tær vunnu sær nevniliga eina tryggu leiðslu alt fyri eitt, og nú sá Mjølnir út til at hava funnið rætta spælið fram. Servurnar vóru nógv betri, og so riggaðu móttøkurnar eisini betri í hesum settinum. Fleyr kláraði í sínum lag slett ikki at fylgja við Mjølni, sum vann ein sannførandi 25-15 sigur í triðja setti, og so var dysturin aftur púra opin.

Í fjórða setti hendi júst tað sama, sum í triðja. Mjølnir koyrdi á, og heldur ikki í hesum settinum megnaði Fleyr at fylgja við. Mjølnir var nú rættiliga komið í gongd, og enn einaferð vunnu tær sannførandi. Úrslitið av fjórða setti gjørdist 25-18, og so mátti javnbrótari til fyri at finna ein vinnara.

### Tríggir dystir

Í fimta og avgerandi settinum var at kalla eingin munur á liðunum. Tey skiftust um at fáa stig, og liðini fylgdust so at siga allan vegin. Síðstu løtuna vóru tað tó leikararnir hjá Fleyr, sum høvdu betru nervarnar, og tær vunnu eisini fimta sett 16-14. Sostatt skal ein triði dystur til, áðrenn ein vinnari kann finnast.

Við sigrinum heldur Fleyr sostatt framvegis fast í vónini um at fáa eitt pláss í meistaradeildini hjá kvinnum komandi kappingarár.

## Føroyski hópurin

**Málmenn:**
Jákup Mikkelsen (B36)
Meinhardt Joensen (KÍ)

**Verja:**
Atli Danielsen (Frem)
Marni Djurhuus (EB/Streymur)
Jón Rói Jacobsen (AaB)
Óli Johannesen (TB)
Mortan úr Hørg (HB)
Rasmus Nolsøe (HB)
Fróði Benjaminsen (B36)

**Miðja:**
Mikkjal Thomassen (B36)
Hanus Thorleifsson (B36)
Jákup á Borg (HB)
Sámal Joensen (GÍ)
Símun Samuelsen (Keflavík)
Tem Hansen (Fremad Amager)
Súni Olsen (AaB)

**Álop:**
Rógvi Jacobsen (HB)
Christian H. Jacobsen (HB)
Andrew av Fløtum (Fremas Amager)
Christian L. Holst (Lyngby)

## Ukrainski hópurin

**Málmenn:**
Olexander Shovkovsky (Dynamo Kiev)B8ohdan Shust (Shakhtar Donetsk)
Andriy Pyatov (Vorskla Poltava)

**Verja:**
Andriy Nesmachniy (Dynamo Kiev)
Dmytro Chigirinsky (Shakhtar Donetsk)
Olexander Kucher (Shakhtar Donetsk)
Andriy Rusol (Dnipro Dnipropetrovsk)
Volodymyr Yezersky (Dnipro Dnipropetrovsk)
Oleg Shelayev (Dnipro Dnipropetrovsk)
Olexander Romanchuk (Dnipro Dnipropetrovsk)
Vyacheslav Svidersky (Chornomorets Odesa)

**Miðja:**
Oleg Gusev (Dynamo Kiev)
Ruslan Rotan (Dynamo Kiev)
Taras Mikhalik (Dynamo Kiev)
Serhiy Rebrov (Dynamo Kiev)
Maxim Kalinichenko (Spartak Moscow)
Yevhen Levchenko (Groningen)
Anatoly Tymoshchuk (Zenit St Petersburg)
Serhiy Nazarenko (Dnipro Dnipropetrovsk)

**Álop:**
Oleksiy Belik (Shakhtar Donetsk)
Andriy Vorobei (Shakhtar Donetsk)
Andriy Shevchenko (Chelsea)
Andriy Voronin (Bayer Leverkusen)